# TRYGDARÆTLAN

## Arbeiði í tunlum

### 1. Mannagongd og ábyrgd

Byggiánarin skal tryggja, at arbeiðini, áðrenn byrjað verður, verða løgd soleiðis til rættis, at atlit verður tikið at trygdini hjá starvsfólkunum. Tryggjast skal, at óhapp ikki stendst av arbeiðinum, og at skaðin verður avmarkaður, um vandastøða skuldi tikið seg upp.

Arbeiðstakarin skal kunnast um, at trygdaratlit eru knýtt at arbeiði í tunlum, og at mannagongdir skulu vera fyri tey ávísu arbeiðini, har lagt verður upp fyri møguligum hendingum, sum kunnu koma fyri. Arbeiðstakari kann vera byggiánarin sjálvur ella ein ella fleiri uttanhýsis arbeiðstakarar.

Byggiánarin hevur ábyrgd av, at arbeiðstakari ger sær trygdarætlan og virkar eftir henni. Eitt eintak av trygdarætlanini skal altíð verða á arbeiðsstaðnum og eitt eintak hjá **Landsverki.**

### 2. Trygdarætlan fyri arbeiðið

Trygdarætlanin (Tilbúgvingarætlanin) skal taka fyrilit til tað arbeiðið, sum fer fram, men nøkur minstukrøv eru til arbeiðstakaran:

- skeið í fyrstuhjálp
- brunaskeið
- góðkent skeið í «Vegurin sum arbeiðspláss»

Trygdarætlan skal verða gjørd fyri øll arbeiði í tunlum. Ætlanin umfatar krøv, sum Landsverk setir til trygd undir arbeiðið í tunlum. Allar aðrar ásetingar og lógir, til dømis graviloyvi og krøv viðvíkjandi arbeiðsvernd, skulu eisini fylgjast.

Hjálagt er oyðiblað fyri trygdarætlan fyri arbeiði í tunlum.

| | | |
|---|---|---|
| Byggiánari: | **Landsverk**<br>**340800** | *(dato og undirskrift)* |
| **Arbeiðstakari:** | **(navn)**<br>**(telefon nummar)** | *(dato og undirskrift)* |
| **Slag av arbeiði:** | *(tilskilast skal, hvat slag av arbeiði verður gjørt, og tíðarbilið tað fer fram)* | |
| **Tíðarskeið:** | | |

**1. Manning á arbeiðsstaðnum**

| | | |
|---|---|---|
| Mesta manningartal | | |
| Tal av fólki við eldsløkkiførleika | | *Minst helvtin av arbeiðsfólkinum á hvørjum liðið skal hava eldsløkkiførleika.* |
| Tal av fólki við førleika í fyrstuhjálp | | *Minst helvtin av arbeiðsfólkinum á hvørjum liðið skal hava fyrstuhjálparskeið.* |

**2. Ferðsla í tunlinum**

| | |
|---|---|
| Er tunnilin opin fyri ferðslu undir arbeiðinum | Ja ☐ Nei ☐ |
| Er ferðslustýring undir arbeiði | Ja ☐ Nei ☐ |
| Viðmerking: | |

### 3. Arbeiðsumhvørvið í tunlinum

- Tá ið tunnilin er stongdur fyri ferðslu, men arbeitt verður í tunlinum, skal skipast soleiðis fyri, at onnur koyribreytin, har tað er møguligt, verður hildin opin fyri neyðsynjarkoyring.
- Um arbeitt verður, meðan ferðsla er í tunlinum, eru ásetingar fyri arbeiðara heilsu- og trygd. Um tað ikki er sjálvvirkandi CO/NO-ávaring í tunlinum, skal mátari vera á staðnum, ið mátar CO/NO-innihaldið í luftini (ppm), meðan arbeitt verður.
- Arbeiðstakarar skulu verða í góðkendum trygdarklæðum (3. flokki).
- Arbeiðsstaðið skal verða væl upplýst, fyri trygdina skyld.
- Royking er ikki loyvd undir arbeiði í tunlum

### 4. Útgerð, maskinur o.t. nýtt í sambandi við arbeiðið *(set kross ella skriva)*

| | |
|---|---|
| Skúrur | ☐ |
| Bingja | ☐ |
| Kompressari | ☐ |
| Generator | ☐ |
| Amfo-blandari | ☐ |
| Lyfta | ☐ |
| Gravimaskina | ☐ |
| Útgerðarbilur | ☐ |
| Annað:<br>*Reglan er, at hava minst møguligt tilfar inni í tunlinum* | |

### 5. Tilfarsyvirlit

| | Inni í tunlinum | Uttanfyri tunnilin |
|---|---|---|
| a. Eldført byggitilfar | Ja ☐ Nei ☐ | Ja ☐ Nei ☐ |
| b. Spreingievni | Ja ☐ Nei ☐ | Ja ☐ Nei ☐ |
| c. Eldfimur løgur | Ja ☐ Nei ☐ | Ja ☐ Nei ☐ |

| | | |
|---|---|---|
| d. Eldsløkkiútgerð | Ja ☐ Nei ☐ | Ja ☐ Nei ☐ |
| e. Avsperringarskelti | Ja ☐ Nei ☐ | Ja ☐ Nei ☐ |
| f. Samskiftistól | Ja ☐ Nei ☐ | Ja ☐ Nei ☐ |

| | | |
|---|---|---|
| g. Byggipláss innrætting | Ja ☐ Nei ☐ | Ja ☐ Nei ☐ |
| h. Hóskandi fráleiki millum tilfar. | Ja ☐ Nei ☐ | Ja ☐ Nei ☐ |
| i. Hóskandi fráleiki til eldfim evni. | Ja ☐ Nei ☐ | Ja ☐ Nei ☐ |

Krøv:
*a) Minst møguligt eldført byggitilfar skal verða í tunlinum.*
*b) Einki spreingievni má verða í tunlinum, meðan hann er opin fyri ferðslu.*
*c) Áfylling av eldfimum løgi má ikki verða í tunlinum, meðan hann er opin fyri ferðslu.*
*d) Minst møguligur eldfimur løgur skal verða í tunlinum undir arbeiðinum*[1].

---

[1] Bensin skal ikki nýtast inni í tunlum.

**6. Tekning av arbeiðsøkinum**

Tekningin vísir arbeiðsøkið, arbeiðstól, tilfar, avsperring o.a.

# Leiðreglur/Mannagongd við óhapp

**Eldur í tunlinum**

| | |
|---|---|
| | Lítil eldur – brúka sløkkiútgerð á staðnum |
| | Størri eldur – ring altíð 1 1 2 |
| | Ávara og steðga ferðsluni |
| | **Set ikki teg ella onnur í vanda** |
| | Sperra fyri ferðslu inn í tunnilin við báðar tunnilsmunnarnar |
| | Set fólk at taka ímóti sløkkiliði, ambulansu og politinum |
| | Boða frá til byggiánara (340800) og arbeiðstakara(_________) |

**Annað óhapp**

| | |
|---|---|
| | Ávara og steðga ferðsluni |
| | **Set ikki teg ella onnur í vanda** |
| | Sperra fyri ferðslu inn í tunnilin við báðar tunnilsmunnarnar |
| | Boða frá til byggiánara (340800) og arbeiðstakara(_________) |
| | |

Fólkaskaði

| Fær fólk minni skaða | Fær fólk størri skaða | Álvarsamur skaði |
|---|---|---|
| Gev bráfeingis hjálp úr fyrstuhjálparkassanum | Gev fyrstuhjálp úr fyrstuhjálparkassanum | Gev fyrstuhjálp úr fyrstuhjálparkassanum |
| Boða arbeiðstakaranum frá | Boða frá á 112 | Boða frá á 112 |
| Boða trygdarumboðnum frá | Steðga øllum arbeiði | Steðga arbeiðinum og ferðsluni |
| | Boða byggiánaranum frá | Boða byggiánaranum frá |
| | Boða arbeiðstakaranum frá | Boða arbeiðstakaranum frá |

**Trygdarætlanin er dagførd 20.12.2016**